# Bráðsjúku-
# tryggging

BANK**NORDIK**

### Bráðsjúka

Álvarslig sjúka kann hava fíggjarligar fylgjur. Vit bjóða tær eina trygging, sum veitir útgjald í sambandi við álvarsliga sjúku, og sum sostatt tryggjar teg fíggjarliga, skuldi sjúka borist á.

### Børn

Hevur tú børn, fevnir tryggingin eisini um børn tíni frá føðing, til tey eru 18 ár, um tey fáa eina álvarsliga sjúku. Talan er bæði um biologisk og ættleidd børn hjá tær og hjá tínum hjúnafelaga ella sambúgva.

### Hvør kann tekna Bráðsjúkutrygging?

Bráðsjúkutrygging verður teknað sum ískoyti til eina Bólkalívstrygging ella eina Restskuldartrygging. Tað er tó ein treyt fyri at tekna Bráðsjúkutrygging, at tú eisini hevur Bólkalívstrygging ella Restskuldartrygging frá NordikLív við eini tryggingarupphædd á í minsta lagi 575.000 kr.

Harumframt skalt tú vera millum 18 og 51 ár, og tú skalt kunna útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Tryggingarfulnaðurin heldur uppat, tá tú fyllir 67 ár, og fyri børnini, tá ið tey fylla 18 ár.

### Prísur og tryggingarupphæddir

Tú kanst velja eina tryggingarupphædd á annaðhvørt 115.000 kr. ella 230.000 kr. og tilhoyrandi tryggingarupphædd fyri børn, sum er ávíkavist 69.000 kr. ella 130.000 kr. Upphæddin verður útgoldin, um sjúkan verður staðfest í tryggingartíðarskeiðinum, og um tú lýkur tryggingartreytirnar. Eingi krøv eru til, hvussu peningurin skal nýtast.

| **Tryggingarupphædd** | **115.000 kr.** | **230.000 kr.** |
| --- | --- | --- |
| **Børn** | **69.000 kr.** | **130.000 kr.** |
| **Gjald um mánaðin** | **86.25 kr.** | **166.75 kr.** |

### Útgjald

Útgjaldið verður goldið út í einum, um tú fært staðfest eina av teimum sjúkum, sum tryggingin fevnir um. Tryggingarupphæddin verður útgoldin skattafrítt

Neyvari treytir fyri útgjald, hvørjar sjúkuavgerðir eru fevndar og undantøk eru at finna í tryggingartreytunum fyri bráðsjúkutrygging. Hevur tú, áðrenn tryggingartíðin byrjar, fingið staðfest eina álvarsliga sjúku, er henda sjúkuavgerð ikki fevnd av tryggingini.